»nýggj blóma«, var skjótt at síggja mótsetningarnar millum gamalt og nýtt, millum fátækradømi og vælstand.

Tað var løgið at koma úr Europa og til Addis Abeba. Alt var øðrvísi. Á vegnum inn frá flogvøllinum var nógv forkunnugt at síggja. Sum asnar, sum gingu undir so tungum byrðum, at teir tóktust hvørja løtu at hokna undan teimum. Aftanfyri gingu menn, sum áhaldandi slerdu asnarnir, um teir ikki gingu nóg skjótt. Onkur kom við einum bundi av livandi hønum hangandi við høvdinum niðureftir, samanbundnar í ein stong. Tær skuldu helst seljast á einum marknaði. Mær tykti synd í hønunum, sum tær hingu.

Framvið vegnum vóru smáttur, har dyrnar vóru opnar. Tá ið vit koyrdu framvið sóu vit eldin á gólvinum. Uttanfyri gingu børn og spældu.

## Drotningin av Saba

Í einum øðrum faldara í flogfarinum stóð, at »nú er tú á veg til landið hjá drotningini av Saba«. Vit kenna øll frá Bibliuni søguna um hesa drotning, sum kom at vitja Salomon kong. Hon var ovfarin av øllum hon sá, sum var nógv meira enn hon roknaði við, tá ið hon kom.

Søgnin í Etiopia sigur, at drotningin av Saba fekk ein son við Salomon kongi. Hesin drongurin kallaðist Menelik. Hann fór sum vaksin at vitja pápa sín í Jerusalem,



*Hetta er málningur hjá Suna, beiggja Elsu, av gomlu Norðragøtu. Fremst er kirkjan. Næsta hús er hjá Peri, har Elsa vaks upp*

og søgnin sigur, at tá stjól hann sáttmálaørkina hjá jødum og tók hana heim við til Etiopia. Koptiska kirkjan í Etopia sigur, at ørkin er hjá teimum. Men prógva tað kann hon ikki, sum tað sást í eini sjónvarpssending um dagarnar!

## Hópdópur

Tað er eisini søgan í nýggja testamenti um hirðmann hjá Kandake drotning. Kandake var tittulin hjá



*Abbi Elsu, Magnus, sum gekk burtur á Gøtuvík í 1918*

drotningini. Hann hevði verið í Jerusalem og hildið bøn. Tá er tað, at Filip kom fram á hann, og hetta endar við, at etiopiski hirðmaðurin verður doyptur.

Ár 300 verður kristindómurin statsreligión í Etiopia. Har hevur tó ikki verið nøkur beinleiðis missionering. Tey hava havt hópdóp, har vatn verður slett yvir eina rúgva av fólki. Síðan fingu tey ein bláan tráð um hálsin sum tekin um, at tey eru doypt og hoyra til koptisku kirkjuna. Men tey hava ikki fingið stórvegis upplæring í kristindóminum. Koptiska kirkjan hevur nógvar kirkjur og nógvar prestar. Har ganga prestarnir runt við roykilsiskerum og messa við krossi í hond. Teir lata fólkið kyssa krossin og bíbliuna.

Fólkið veit ikki, hvat stendur í Bíbliuni. Men tey hava eina ærufrykt fyri kirkjuna. Tá tey koma hagar leggja tey seg framyvir, og tá tey kom inn í kirkjuna kyssa tey durastavirnar. Ein stór kirkja er mitt í Abbis Abeba. Hon er rund og nógvar av kirkjunum eru rundar. Aðrar eru ferhyrntar. Mitt í koptiskum kirkjum er eitt modell av sáttmálaørkini. Har sleppur eingin inn. So er ein ringur rundan um, og har er tað, at prestarnir standa við roykilsiskerunum og skipa fyri gudstænastuni. Í uttasta ringinum er fólkið, sum situr á gólvinum, og tey kunnu so sita og smápráta saman. Tey skilja kortini einki.

Brúkt verður eitt deytt mál sum eitur geez, og sum eingin skilir. Bíblian var bert á hesum málinum. Men nú er hon so týdd til amarinja, sum amarhararnir skilja. Hetta er eitt trupult mál at læra. Tað eru ikki færri enn 276 bókstavir og tekn. Tað eru so nógv fólkasløg í Etiopien, og tað eru framvegis nógv, sum ikki skilja almenna málið. Flestu fólkasløgini hava ikki skriftmál.

Tað er bert ein partur av fólkinum, sum hoyrir til koptisku kirkjuna. Tað eru um 70 mill. fólk í Etiopiu, og tað eru nógv ymisk fólkasløg. Tey búgva hvør sær, hava sítt egna mál og blanda seg ikki við onnur. Hetta er kanska við at broyast eitt sindur nú.

## Landið

Hildið verður, at navnið Etiopia kemur av tveimum griskum orðum. Aito sum mekrir at brenna og ops sum merkir andlit. Hetta merkir tískil: Landið har tey sólbendu búgva.

Stórur partur av landinum er hálendi og fjallaland. Uppi í hæddini eru næturnar kaldar. Niðri á láglendinum er aftur ímóti tropiskur hiti. Summa staðni eru oyðimerkur, har sum tað næstan ongantíð regnar. Aðrastaðni er tættur frumskógur, og tað skiftir frá gróðrafátækum lendi til tað gróðraríkasta, sum hugsast kann.

Fólkið er líka fjølbroytt. Tað eru minst 70 tjóðflokkar, sum hvør talar sítt egna mál. Umframt eru í landinum 200 dialektir.

Amahararnir er leiðandi tjóðflokkurin í landinum, hvat ið mentan og politikki viðvíkir. Teir eru ljósabrúnir á liti. Teir fluttu í fyrsta ártúsind undan Krist inn í landið frá Suður-Arabia og blandaðu seg við fólkið, sum tá búði í Etiopia. Teir eru av semitiskari ætt og tala eitt mál, sum minnir ikki sørt um hebraiskt. Stórur partur av teimum hoyra til koptisku kirkjuna.

Oromofólkið er størsti tjóðflokkur í landinum. Teir troðkaðu seg í 15. øld inn í landið sunnanifrá. Teirra mál, Oromo, er tað málið, sum flestu etioparar tala. Hóast tað hava teir fyri fáum árum síðani skriftmál. Bíblian er nú eisini á teirra máli. Ein partur av teimum eru muslimar. Aðrir hava tikið við koptiskari trúgv, og síðan er tað heidningar, og tað er serliga millum hesar, at kristniboðararnir starvast.

Síðan er tað somalitjóðflokkurin, sum býr í ein landsynning. Teir eru muslimar.

Seinast er at nevna Shankallatjóðflokkurin, sum býr í heitu dølunum í vestasta parti av landinum móti Sudan. Teir eru sera



*Hetta er Súnastova, haðani mamma Elsu var ættað. Teknað hevur Sune Jacobsen. Húsini eru ikki til longur*

dimmir á liti og eru heidningar.

Her er vissuliga ein blanding av fólkasløgum, við ymiskum málum og mentanum. Men landið er eisini størri enn Frankaríki og Týskland tilsamans.

## Hús og klæðir

Ymiskleikin kann lýsast við teimum ymisku húsaviðurskiftunum og klædnabúnum. Húsini eru frá vanligum sethúsum í Addis Abeba til rundar smáttur i ymiskari støðd og úr ymiskum tilfari úti um landið. Í Sidamo, millum Konso og Addis Abeba, eru smátturnar sum oftast úr flættaðum bambus og eru snotuligar á at líta. Hinvegin eru tær í Konso gjørdar av leiri við strátaki og mugu ofta umvælast.

Eisini eru klæðini ymisk frá einum plássi til annað. Amahararnir og onkrir aðrir tjóðflokkar nýta hvít klæði. Kvinnurnar eru í kjóla við breiðum vovnum borda í neðra. Umframt nýta tær eitt stórt stykki úr sama toyi, sum tær leggja um herarnar á ein serstakan hátt. Menninir nýta buksur, sum líkjast ríðibuksum. Tær liggja at beinunum niðanfyri knæ, og eru víðari omanfyri. Afturat hava teir skjúrtu, sum teir hava uttan á buksunum og røkka niður á knæ. Uttast hava teir hvítan jakka.

Í Konso eru pløggini ikki so mong. Har nýta kvinnurnar skinnskjúrt og menninir skinnbuksur, og annars hava tey eitt teppi at sleingja um seg, tá ið kølið er. Skinnklæðini vórðu seinni bannað. Tá fóru tey at dyrka bummill og veva klæði sjálvi.

## Til Konso

Í Addis Abeba er høvuðsstøðin hjá missiónini, og her verður alt tað praktiska fyriskipað í samband við virksemið kring landið. Her er eisini málskúli fyri trúboðarar og skúli fyri børn hjá trúboðarum.

Eg var verandi tveir dagar í Addis Abeba, so gekk leiðin suður eftir til Konso, sum er 600 km sunnanfyri Addis Abeba. Eg skuldi fylgjast við eini norskari sjúkrasystir, sum fór til Nigelli, ein missiónsstøð 400 km eystanfyri Konso.

Vit fóru kl. 5 á morgni við einum bussi, sum var stúgvandi fullur av fólki.

Vegirnar vóru góðir at byrja við, men blivu verri og verri. Vit leigaðu seinni ein Landrover við førara. Slíkan biltúr hevði eg ikki roynt fyrr. Stundum lá bilurin nærum á liðuni. Aðrar tíðir rendu vit høvdið upp móti takið, og komu dettandi niður á okkara viðføri.

Eg var i Negelli í 14 dagar, meðan eg bíðaði eftir einum norskum trúboðara, sum skuldi taka meg við til Konso. Í bíðitíðini hjálpti eg til á norska missiónssjúkrahúsinum, har tað var pláss fyri 60 sjúklingum.

Loksins tann 5. oktober, ein mánaða eftir, at vera farin úr Føroyum kom eg fram til Konso.

Har vóru eini íslendsk hjún Margret Hróbjartsdóttir og Benadikt Jasonarson. Eg kom sum áður nevnt at avloysa eina íslendska sjúkrasystir, sum var farin heim.

Higar til klinikkina kom á hvørjum degi hópur av sjúklingum og mong vóru sera sjúk. Tað var so javnan, at 20-30 mans komu við einum sjúklingi, sum teir skiftust um at bera langa leið.

Hvønn morgun, áðrenn vit byrjaðu, høvdu vit andakt.

**Næstu ferð**

Í komandi parti verður greitt meira frá søguni hjá Etiopia og um viðurskiftini í landinum, sum eru so langt frá okkara viðurskiftum, sum tað í heila tikið kann hugsast. Eisini fær Elsa tvíburar!

Sosialurin